




# Restorffs aftur við vargi

ØL
*Tíðindaskriv*

Aftan á nógvar áheitanir hevur Restorffs Bryggjarí gjørt av at halda áfram við framleiðsluni av vælumtókta ølinum Varginum. Hetta er ein spennandi ølur.

Við sínum distinkta runda smakki og klaustrofobisku undirtónum appellerar hann til tann innara úlvin. Vargurin vekir duld minni úr okkara fornu frumtíð, har bert sterkar driftir yvirliva. Vargurin er fyri einstaklingar við stórum yvirego. Hann er kveikjandi í stillum kontemplativum løtum, men vandamikil, tá ein er saman við øllum úlvahópinum tá frumýlini dynja millum fjalla, fullmánin fær ein at hugsa ørandi tankar og armarnir gerast lodnir.

Í dag, hósdagin, fæst Vargurin kring alt landið.

## Pilsnarin

Pilsnarin hjá Restorff hevur nú aftur sín eyðkenda runda og lætta smakk. Í Desember varð latið eitt sindur meira av humli i Pilsnaran, fyri at nærkast smakkinum á Tjekkiskum øli, men føroyski pilsnardrekkarin dámar betur, at minni av humli er í, hetta er nú justerað.

## Føstulávintshald

Restorffs vil fegin koma í samband við arbeiðspláss, feløg, barnagarðar osfrs., sum fyriskipa tunnusláing, dans og føstulávintshald yvirhøvur.









# Tunnusláttur í KÍ høllini

**Leygardagin verður árliga føstulávintstiltakið hjá Klaksvíkar Hornorkestur í KÍ høllini í Klaksvík**

FØSTULÁVINT
*Solby A. Eliasen*



*Aftur í ár verður føstulávintstiltak í KÍ høllini. Klaksvíkar Hornorkestur skipar fyri tunnuslattri og køkutombola leygardagin kl. tvey*

**Klaksvík:**
Tiltakið byrjar klokkan tvey leygardagin við tunnuslættri. Kostnaðurin fyri at koma inn er tjúgu krónur.

Og eins og undanfarin ár verða tunnur til allar aldursbólkar. Heilt frá teimum smæstu børnunum og upp til tey vaksnu. Foreldur fáa ein kaffimunn, meðan tey hyggja at tunnuslættrinum. Øll børnini fáa ein bommpakka, og teir tíggju kattakongarnir fáa ein stóran bommpakka. Tað verða einar tíggju tunnur, sum skulu sláast í gólvið. Tær eru latnar av ymsum stuðlum. Og eisini veitir høvuðsstuðulin hjá hornkestrinum stuðul til hetta tiltakið. Høvuðsstuðul er Norðoya Sparikassi, sum Klaksvíkar Hornorkestur gjørdi stuðulsavtalu við á heysti í fjør.

– Harafturat verður tann fínasta grýlan eisini funnin, og verður eitt hvørt til hana eisini, verður sagt frá Hornorkestrinum.

Eitt, sum hevur eyðkent føstulávintstiltakið hjá Klaksvíkar Hornorkestri, er tað risastóra køkutombola, sum hevur verið tey seinnu árini. Okkurt árið hava vinningarnir verið yvir 300 í tali.

Tiltakið plagar at vara í umleið hálvan triðja tíma, og undirtøkan hevur verið avbera góð. Eini 5-600 børn plaga at fara í KÍ høllina at sláa tunnu Føstulávintsleygardag.

Klaksvíkar Hornorkestur hevur undanfarin ár eisini skipað fyri dansi í høllini um kvøldið, men tað verður av ongum í ár.

– Fyrr gingu altíð nógv í teir sokallaðu gamlamannadansirnar, men tað letur til, at tíðin er farin frá teimum, tí millum lítið og onki fólk hevur verið í dansi seinnu árini, so tað loysir seg ikki hjá okkum at skipa fyri dansi longur, siga tey í Klaksvíkar Hornorkestri.

# Rættarhjálpin 499 áheitanir í fjør

**Tær flestu áheitaninar vóru í samband við arv og skifti, veðhald, fasta ogn, hjúnarskilnað og foreldramyndugleika**

ÁRSFRÁGREIÐING
*Solby A. Eliasen*

Rættarhjálp Føroya var opin í 47 vikur í fjør, og í hesum tíðarskeiði vóru 499 áheitanir. Í ársfrágreiðingini frá Rættarhjálpini sæst, at av áheitanunum eru 86 sakir upprættaðar, harav tær 71 vórðu avgreiddar í árinum.

Tøl frá Ársfrágreiðingini vísa, at tað í meðal hava verið góðar fimm áheitanir um dagin í fjør. Tølini vísa eisini, at flestu áheitaninar koma frá fólki millum 30 og 65 ár. 56% vóru kvinnur, 43% menn og so var 1% felagskapir og onnur. Meira enn helmingurin av áheitanunum komu úr Suðurstreymoy og Nólsoy, men tað er kanska ikki so løgið, tá hugsað verður um fólkatalið.

Tær flestu áheitaninar vóru í samband við arv og skifti, veðhald, fasta ogn, hjúnarskilnað og foreldramyndugleika. Tey bæði seinastu taldu ávíkavist níggju og sjey prosent av øllum áheitanunum.

Rættarhjálp Føroya er ein tænasta, har fólk kunnu venda sær til fyri at fáa ókeypis løgfrøðiliga ráðgeving ella vegleiðing. Hon lat upp í juni mánaði í 1996. Hon er opin fýra tímar um vikuna. Hildið verður til í Havn, men av tí at hon er tann einasta av sínum slag í landinum, er málið at náa alt landið. Tí eru áheitaninar ikki bara persónligar, men eisini um telefonina og skrivligar.

Allar áheitanir verða tó skrásettar, eisini tær um telefon ella skrivligt, so tær ganga eisini inn í hagtølini í ársfrágreiðingini fyri 2002 frá Rættarhjálp Føroya.

